

Gina Krog á veg

# Heimsmet: Flyta 17.000 tons tungan boripall

**Jógvan Hugo Gardar**

22.06.2015 - 23:00

Oljan.fo

Fríggjadagin loystu sleipibátar við stálpartinum av nýggja boripallinum Gina Krog í havnini í Vlissingen í Hollandi. Stálparturin av Gina Krog vigar 17.000 tons, og er størsti stálbygningur sum er bygdur til boripall á eini verksmiðju. Gamla metið átti boripallurin Valemon, ið vigar 9000 tons.

Stálparturin hjá Gina Krog er 142 metrar høgur, og kemur at standa á 50x60 metrum á havbotninum. Pallurin er 30x40 metrar á hægsta punktinum.

Fýra togbátar fingu Gina Krog út úr havnini í Vlissingen, har ein størri togbátur tók yvur og skal flyta Gina Krog í Norðsjógvin har Gina Krog skal standa.

Seinni í summar kemur Maersk Integrator á felti, har hann skal brúka stálpartin hjá Gina Krog til at bora fyrstu holini á feltinum.